# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Eingin vanlukka

**Hvørki Heini Zachariassen, nevndarformaður í Fremad Amager Invest, ella Todi Jónsson hava hug at geva skarvin yvir, hóast Fremad Amager í gjár flutti niður**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*Orðini vóru stór, tá Fremad Amager í mars mánaði kom á føroyskar hendur. Men hóast niðurflytingin var ein strika í rokningini, so ivast føroysku menninir í felagnum ikki í, at felagið hevur stórar møguleikar at gera seg galdandi í donskum fótbólti*

Við málum um superligupláss á 100 ára degnum í 2010 var talan um stórar ambitiónir, tá Fremad Amager í vár fekk føroyskar eigarar.

Uttan fyri vøllin tykist arbeiðið at styrkja leiðslupartin av felagnum eisini at hava gingið eftir vild, men á vøllinum hevur borið heilt illa til.

Tapið sunnudagin var tað níggjunda á rað hjá liðnum. Men sum úrslitini lagaðu seg, hevði tað minni at týða. HIK vann nevnliga sín dyst, og so vildi Fremad Amager undir øllum umstøðum flutt niður.

Niðurflyting var als ikki tað, sum tosað varð um í vár, men hóast hesa, so røður bjartskygni enn millum føroysku íleggjarnar.

### Vóru ikki betri

Heini Zachariasen heldur, at seinastu dystirnir prógvaðu, at hópurin í ár var ikki nóg góður til at spæla í 1. deild.

– Øðrvísi følt tú illa tulkað tað. Við yvirtøkuna vistu vit eisini, at hendan var ov seint í mun til flytingarvindeygað, og einasti spælarin, sum kom í hópin – umfram Toda – var Jónas Tór Næs, sum ikki hevði sáttmála.

Verður talan um stóra spælarafrágongd, nú tit mugu eina deild niður?

- Talan verður í øllum førum um útskifting. So er spurningurin, hvørt tað verður fatað sum til- og ella frágongd.

Tað eru bara fimm vikur, áðrenn kappingin í 2. deild fer ígongd, og málið til komandi kappingarár er púrasta greitt, sigur Heini.

– Tað verður sjálvandi meddað eftir uppflyting alt fyri eitt. Uttan fyri vøllin eru vit væl ávegis í arbeiðinum at styrkja felagið, og sum heild oyðileggur niðurflytingin ikki nakað í so máta. Sjálvandi kann hon gera tað truplari at røkka málinum um uppflyting til superliguna í 2010. Men vit kunnu fegnast um, at fólk her í økinum sýna felagnum stórt álit. Vit høvdu hesa ferð 1.600 áskoðarar, og tá skal hugast um, at hetta var fyri at stuðla einum liði, sum tapti 8-1 seinast. So vit eru spentir uppá, hvussu tað verður, tá liðið eisini fer at vinna, sigur Heini.

### Todi stillar gaggurnar

Á vøllinum verður tað uttan Toda Jónsson, at Fremad Amager má klára seg. Men tað er nú ikki nakað, sum nervar føroyska álopsessið, sum nú skal gera um seg uttan fyri vøllin.

– Eg hevði vónað, at tað als ikki var neyðugt, at eg spældi í ár, men tað var so upp til venjaran. Nú verður tað uttan fyri vøllin burturav, at eg fara at arbeiða.

– Og eg trúgvi framvegis uppá, at vit hava eina bæði góða og spennandi ætlan í felagnum. Fyri føroysku spælararnar, sum koma niður, kann talan enntá vera um fyrimun. Leikliga er ikki tann stóri munurin á 1. og 2. deild í Danmark, men alt annað líka, so vilja møguleikarnir hjá einum ungum spælara at fáa spælitíð vera størri nú, enn teir vóru, um felagið til dømis var í tyngra endanum av 1. deild, sigur Todi Jónsson.

## Bukaðir og niðurfluttir

FÓTBÓLTUR
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

Stóra ætlanin hjá Toda Jónsson við Fremad Amager er í fyrstu atløgu miseydnað. Felagið skal eftir eitt lemjandi tap í dag leika í triðbestu deildini komandi kappingarár

Vónbrotið var stórt, tá ið Fremad Amager í gjár mátti vinka farvæl við næstbestu donsku deildina. Hetta kom eftir eitt lemjandi tap á heili 0-6 móti SønderjyskE. Todi Jónsson og Andrew av Fløtum vór í byrjunaruppstillingini, men Andrew varð útskiftur eftir ein góðan tíma á vøllinum.

Sambært danska Indkast kostar niðurflytingin felagnum millum tvær og tríggjar milliónir, men stjórin í felagnum, Nikolai Kaas-Heilmann, sær framvegis bjart uppá framtíðina.

– Vit kundu væntað at flyta niður, men vit fara framvegis at halda fast við stóru ætlanina, sigur hann við heimasíðuna.

Niðurflytingin kemur eisini at kosta felagnum nógvar leikarar.

– Stór útskifting verður at síggja á liðnum, eingin ivi um tað. Saman við venjaranum hava vit hugt gjøllari at nøkrum leikarum á liðnum, og vit eru komnir til ta niðurstøðu, at fleiri leikarar ikki kunnu vænta sær nakra framtíð í felagnum, sigur Nikolai Kaas-Heilmann.

VIT STUÐLA FREMAD AMAGER
FREMAD A
ATLANTIC AIRWAYS SANSIR SPEKT Eik FØROYATELE Sosialurin